DAGSINS MEINING

Breiða semjan

Samgonguskjalið hevur fingið heitið breiða semjan. Hetta er eitt rámandi heiti, tí tað er rættiliga óvanligt at tríggir av stóru flokkunum manna eina samgongu. Tað var longu eyðsæð fyri seks árum síðani, at ein semja á ríkisrættarliga økinum mátti gerast á einum grundarlagi, har minst tríggir stórir flokkar taka undir við tí. Hetta er nú gjørt, og vónandi kann andstøðan eisini taka undir við tí gongd, ið er sett út í kortið.

Gamaní inniheldur nýggja samgonguskjalið ikki somu orðingar, sum tey tvey undanfarnu, tá tað um ríkisrættarligu støðuna viðvíkur, men sum heild kann sigast, at hetta samgonguskjalið hevur betýðiligt meira kjøt á, enn vit hava verið von við seinastu nógvu árini. Um tær yvirtøkurnar, ið eru settar út í kortið, verða yvirtiknar hetta samgonguskeiðið, so verður hendan samgonga ein størri yvirtøkusamgonga, enn tann seinasta, har vit so at siga bert sóu yvirtøkur í Fiskimálaráðnum og Oljumálaráðnum.

Samgonguskjalið inniheldur eisini greiðar orðingar um figgjar og búskaparpolitikk. Hetta vísir, at nýggja samgongan raðfestir rætt, tí umráðandi verður at forða fyri veruligari kreppu í føroyska búskapinum komandi árini.

Einki samfelag uttan vinnu, og her má sigast, at samgonguskjalið er rættiliga visionert. Gransking og menning eru lyklaorð, men tað er umráðandi at komandi samgonga fer at vísa í verki, at hon veruliga brennir fyri gransking og menning.

Privatisering er eisini á skránni. Ávísar fyritøkur verða nevndar. Tað verður ofta sett rættiliga stereotypiskt upp, at Javnaðarflokkurin konsekvent hevur verið ímóti at privatiserað. Hetta er ikki rætt, tí at formaður Javnaðarfloksins nevndi ein møguleika at lata Føroya Banka partabrøv til allar føroyingar í seinasta valskeiði. Hetta uppskotið bleiv eitt sindur blandað móttikið, men vísir, at privatisering ikki er ein trúarspurningur fyri Javnaðarflokkin.

Trivnaðarmál fylla sum verða man nógv í nýggja samgonguskjalinum. Tað er gott at staðfesta, at man fær nakrar orðingar á økinum, ið ikki bara snúgva seg um tøl. Í samgonguskjalinum eru greið mál, um at gera tingini betri og einfaldari. Hetta er helst ikki ov tíðliga, og tí er bara at vóna, at samgongan fer at koma á mál.

Skúlin skal raðfestast høgt, og er hetta eisini væl útgreinað í samgonguskjalinum. Á hesum økinum er at vóna, at vit fáa meiri stabilitet, enn vit hava havt undir seinastu tveimum samgongum vegna rumbul av ymsum slag. Arbeiðsfriður er ein fortreyt fyri at røkka góðu málunum.

Sjálvt samgonguskjalið er væl skrivað, og ikki er nógv at koma eftir har. Tó verður tað ikki samgonguskjalið, ið hendan samgongan skal metast eftir. Tað verður heldur, hvussu væl hon dugir at røkka málunum og hvussu stevið verður. Verður stevið gott uttan solospæl av ymsum slag, og megnar man at fáa ein konstruktivan dialog við andstøðuna, ja so kann breiða semjan liva upp til sítt navn.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Kollveltandi framtak í føroyskum sambandspolitikki

Hergeir Nielsen

Talan er um politiska lívsverk mítt, segði Anfinn Kallsberg, tá ið hann lovprísaði nýskipanaruppskoti Sambandsfloksins, sum avtalað er at seta í verk í nýggja samgonguskjalinum.

Í nýskipanaruppskoti Sambandsfloksins verða Føroyar roknaðar sum partur av einum ríki, ið er samansett av trimum javntstilláðum londum.

Sambandsflokkurin sigur í hesum uppskoti sínum, at fyri at kunna vera í hesum ríkisfelagsskapi, er neyðugt at nøkur málsøki eru felags fyri alt ríkið. Hesi eru: Kongshúsið, Grundlógin, Uttanríkismál, Verjumál, Gjaldoyra og Rættarskipanin.

Hesi felags málsøki eru »garðurin« rundan um ríkið, sigur Sambandsflokkurin, og tað eru hesi, sum gera, at vit kunnu tosað um eitt ríki, og tey skulu ikki kunna yvirtakast.

Anfinn Kallsberg og Fólkaflokkurin lagað nú garð fyri Sambandsflokkin. Teir viðurkenna ríkiseindina, og teir samtykkja í nýggja samgonguskjalinum, at: »Málið er at greiða viðurskiftini millum Føroya og Danmarkar. Hetta skal gerast við lóg, so løgtingið hevur heimild at yvirtaka øll mál, undantikið málsøki, sum viðvíkja ríkiseindini«.

Hetta er klokkukar tala. Sjálvsavgerðarrætturin er sleptur, og viðurkent verður, at Føroyar eru partur av ríkiseindini.

Mál innanfyri ríkiseindina verða nú liggjandi, har tey liggja. Tey eru mo. grundlógin, uttanríkismál og rættarskipanin. Mál, sum vit vóru komin áleiðis við at skipa undir føroyskum málsræði.

Fólkaflokkurin fekk áhaldandi áheitanir um at endurskipa sjálvstýrissamgonguna. Hann fekk tað í boði, áðrenn valið varð útskrivað, og honum stóð í boðið eftir valið at vera við til at endurskipað ta styrknaðu sjálvstýrissamgonguna.

Men nei. Fólkaflokkurin frávaldi einar frælsar Føroyar og valdi í staðin at lagað garð uttan um ríkiseindina saman við Sambandsflokkinum.

Vit harmast hetta kollveltandi framtak í føroyskum sambandspolitikki.

Vit harmast um, at tað eyðnaðist javnaðar- og sambandsflokkunum at seta orð á ein nýskipaðan sambandspolitikk, og enn meira harmast vit um, at Fólkaflokkurin sær tað sum lívsverk sítt at laga Garð um henda nýggja ríkisfelagsskapin.

Óli Jacobsen sigur ósatt

Hjalti í Jákupsstovu

Tað passar ikki, at leiðandi fiskifrøðingar á Fiskirannsóknarstovuni mótarbeiða fiskidagaskipanini, sum Óli Jacobsen skrivar á forsíðuni í FF-blaðnum 29. januar 2004.

Fiskirannsóknarstovan var við í nevndini, sum kom við tilmælinum um skipanina, tók undir við henni tá og tekur undir við henni enn.

Fiskirannsóknarstovan hevur sambært lógini um vinnuligan fiskiskap til uppgávu at ráðgeva Føroya Landsstýri í málum um burðardyggan fiskiskap, og hevur í hesum sambandi í fleiri ár mælt til at minka um dagatalið. Hetta við virðing fyri fiskastovnunum og dagaskipanini, og fyri at dagaskipanin skal virka sum ætlað. Tað er ein stór misskiljing, um hetta verður fatað, sum um Fiskirannsóknarstovan er í móti dagaskipanini. Tað er beint tvørtur ímóti.

Grundarlagið undir skipanini er, at dagatalið er sett soleiðis, at í miðal yvir nøkur ár verður fiskað tað, sum hvør stovnur framleiðir, og ikki meiri. Við alsamt vaksandi veiðiorku í fiskiskipaflotanum er neyðugt, alsamt at stilla dagarnar til henda vøkstur. Fiskirannsóknarstovan nýtir, sum er , stovnsmetingarnar til at meta um veiðiorkuna, og við tí hagtalstilfari, sum er til taks, og við tí játtan til kanningar, sum er, er einki betur tilfar.

Tilgongdin av ungum fiski skiftir frá einum ári til annað, og viðhvørt eru fleiri ring ár upp í røkur, sum til dømis alla seinnu helvt av áttati árunum. Dagatalið má tí eisini setast so, at stovnarnir tola vánaliga tilgongd í fleiri ár, uttan at ganga gýtingarstovnunum ov nær. Tíbetur vita vit ikki, hvussu smáir gýtingarstovnarnir av flestu stovnunum av botnfiski undir Føroyum kunnu verða, uttan at hetta nervar tilgongdina framyvir. Men heldur ikki eiga vit at miða eftir at fáa hesa vitan.

Einhvør skipan má nýtast við virðing fyri fortreytunum fyri skipanini, og hetta er eisini galdandi fyri dagaskipanini. Síðan 1996 hevur frameiðslan av æti undir Føroyum verið góð, og hetta hevur eisini givið góða framleiðslu av fiski. Men hyggja vit afturlítandi eftir, hvussu væl t.d. toskur undir Føroyum er vaksin, vita vit, at hetta er ikki altíð so, og hesum mugu vit eisini taka hædd fyri.

Umboð fyri Fiskirannsóknarstovuna hava í trimum førum í 2003 verið uttanlands og greitt frá skipanini, í Bergen í august, í Hetlandi í september og í Edinburgh í oktober, og sagt frá hví hon er góð fyri okkum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Viðmerking til nýggju samgonguna og samgonguskjalið:

Søgulig breið semja um samband og ríkiseind

Tórshavn, 31. januar 2004

Høgni Hoydal
Vegna Tjóðveldisflokkin

Tjóðveldisflokkurin ynskir nýggju samgonguni við Jóannesi Eidesgaard sum løgmanni, tillukku við skipanini og samgonguskjalinum. Vit vóna, at okkurt gott spyrst burturúr landi og fólki at frama.

Eisini er okkurt í samgonguskjalinum, sum vit fegnast um. Eitt nú eru góðar orðingar um gransking og førleikamenning. Og á sosiala økinum eru fleiri mál, sum Tjóðveldisflokkurin hevur stungið út í kortið, sum nýggja samgongan sigur seg vilja fremja.

Ongin kós fyri framtíðina
Kortini harmast Tjóðveldisflokkurin almikið um, at nýggja samgongan onga kós og ongi mál hevur sett fyri framtíðina, men hevur slept øllum stríði fyri sjálvstýri og einum sjálvberandi búskapi.

Áhaldandi royndirnar hjá Tjóðveldisflokkinum at fáa ávirkan og skipa eina samgongu, ið kundi halda fram á sjálvstýrisleiðini, hava ikki eydnast.

Samgonguskjalið er ein sera tunn súpan, har fleiri sera høgravendir bollar liggja á botni – tildømis ófiggjaðir skattalættar og studningsskipanir til vinnuna. Orðingar á hinum økjunum eru endurtøkur av gomlum samgonguskjølum og valskráum.

Fyrstu ferð dansk ríkiseind er orðað í føroyskum politikki
Tó er mest herskni bitin í samgonguskjalinnum, at tað hevur eydnast Sambandsflokkinum at fáa Fólkaflokkin at viðurkenna eina danska ríkiseind.

Samgonguskjalið sigur greitt, at føroyskir myndugleikar skulu hava loyvi sambært lóg at yvirtaka málsøkir, ið ikki hoyra undir ríkiseindina – og hetta er sama orðing, sum sambandsflokkurin hevur fört fram í sínum politikki. Hetta er eisini sama krav, sum danska stjórnin hevur sett í samráðingunum við føroyskar myndugleikar – og júst hetta krav var orsøkin til, at samráðingarnar um føroyskt fullveldi slitnaðu í ár 2000.

Tá var málið føroyskt fullveldi, tjóðarfrælsi og viðurkenning av sjálvsavgerðaraettinum hjá føroyingum. – Nú verður fyri fyrstu ferð í politisku søgu Føroya skrivað undir eitt skjal, ið viðurkennir dansku ríkiseindina, og har frælsismálið er heilt slept.

Hetta er sostatt ein søgulig breið semja um samband og ríkiseind, har Fólkaflokkurin tíverri er koppaður yvir til gomlu heimastýrisflokkarnar.

Tjóðveldisflokkurin brynjar seg nú til at fara í andstøðu. Har verður setningurin við ítøkiligum uppskotum at halda kósina fram móti føroyskum fullveldi, sjálvberandi búskapi, sosialum frambrotum, frælsum vinnulívi og einum nútímans útbúgvingar- og mentanarpolitikki.

Heimleys í Havn

Heidi Petersen
Løgtingskvinna Tjóðveldisfloksins, Vestmanna

Fíggjarlógaruppskotið 2004
Undanfarna samgonga setti sær fyir at bøta um viðurskiftini hjá heimleysum í Føroyum. Hetta var gjørt á tann hátt at 2 mió. kr. vóru settar av á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004, til bygging/keypi av býlum til heimleys í Havn, afturat teimum 300.000 kr. sum vóru avsettar sum ískoyti til rakstur av herberginum hjá Frelsunarherðinum. Útveganin av bústøðum til heimleys í Havn skuldi gerast í samstarvi við Frelsunarherðin, Blákrossheimið, Heilbrygdi og Tórshavnar kommunu, og tyktist hetta at vera ein gongd leið.

Landskassin rindar íløguna og kommunan og landskassin lata so ávist gjald fyri raksturin á hvørjum árið, og arbeiðið liggur so í tryggum hondum hjá Frelsunarherðinum og hinum stovnunum.

Landsuppgáva
Í hesum føri er rætt av landsmynduleikunum at gjalda fyri íløguna, tí tað kann ikki sigast at Tórshavnar kommuna einsamøll eigur trupulleikan við heimleysum, tá tað jú eru fólk úr øllum landinum sum búgva á gøtuni í Havn. Slóðbrótandi arbeiðið hjá Frelsunarherðinum, við herberginum fyri teimum heimleysu í Havn, hevur vist okkum týdningin av tí sjálvbodna arbeiðnum, kristiligir felagsskapir leggja í okkara samfelag, og er tað politikarana ábyrgd at taka málið upp tá torvurin er so væl lýstur sum í hesum føri. Vert er eisini at taka fram arbeiðið hjá Blákrossheiminum í Havn, har fólk bæði fáa viðgerð fyri misnýtslu, men har eisini stórt arbeiði verður gjørt fyri at hesi fólk fáa møguleika at fóta sær aftur í lívinum, við m.ø. møguleikanum fyri búfelagsskapi eftir viðgerðina. Blákrosskafeín er eisini ein týðandi liður í sosiala arbeiðinum at skapa gott og mennandi umhvørvi fyri útsettar bólkar av samfelagnum.

Áheitan
Men hvat hendir nú? Vil nýggja samgongan halda fram við tí arbeiði Tjóðveldisflokkurin byrjaði fyri at tey heimleysu skuldu fáa sømilig kor?

Ella dettur hetta burtur tí flokkarnir í sínum rúsi eftir makt gloyma veikastu bólkarnar í samfelagnum? Vónandi gongur ikki so, og vil eg her nýta høvi at gera vart við tørvin hjá einum veikum bólki í samfelagnum, har tað eftir míni metan er ein samfelagsskylda og ábyrgd at útvega og tryggja sømilig kor. So mín heilsan til nýggju samgongana skal vera góða eydnu framyvir og gloymi ikki tey sum mest tørvar tykkum.

Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin undrast á samgonguskipan

TÍÐINDASKRIV

Nú ein nýggj samgonga tykist vera komin undir land, vilja vit ynskja henni góða eydnu. Tó undrast Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin á politisku gongdina.

Valúrslitið gav dygga undirtøku fyri, at sjálvstýrisgongdin skuldi halda fram, og teir flokkarnir, sum hava stuðlað tjóðarfrælsinum, komu styrktir burturúr valinum.

Tí vóru allir møguleikar at halda fram á sjálvstýrisleið, at halda ein skynsaman búskaparpolitikk, at tryggja vælferðina og fremja ein greiðan vinnulívspolitikk.

Kortini verður nú skipað ein sambandssamgonga, har Fólkaflokkurin er stuðulsflokkur.

Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin hava boðað Fólkaflokkinum greitt frá, at vit eru til reiðar at skipa eina samgongu, ið kann halda fast um sjálvstýrisgongdina, og hetta standa flokkarnir framvegis við.

Tórshavn, 31. januar 2004

Tjóðveldisflokkurin
Høgni Hoydal

Miðflokkurin
Jenis av Rana

Tey gera okkum ník

Anna Djurhuus
Porkeri

Hoyrdi í tíðindunum fyri nøkrum vikum síðani um, at læknar høvdu funnið fram til eina tøkni, sum kundi ávísa, um kvinna við barn bar barn við Downs syndrom (mongolismu) undir belti. Tað ljóðaði fyri mær, sum um hetta vóru gleðilig tíðindi, ella ein sensatión. Jú, vit einum skannara kundu læknar kanna, um barnið hevði ein ávísan nakkafald. Um so var, bleiv tilboð givið um at gera ein fosturvatnsroynd, sum so endaliga kundi staðfesta, um tað veruliga var Downs syndrom. Barnið kundi so takast.

Við hesum blivu »bert« 5 børn við Downs syndrom fødd í Danmark um árið ístaðin fyri 60-70.

Annað floks menniskju?
Eg sat eftir við einari lognari kenslu, tá eg hevði hoyrt tíðindini og hugsaði við mær sjálvari: Hvat mugu foreldur at børnum við Downs syndrom hugsa, hvat mugu tey sjálvi hugsa. Eru hetta »2. floks menniskjur«.

Eg eigi sjálv fimm sokallað vælskapt børn, og kann kanska ikki seta meg í stað teirra, sum eiga børn við breki, men eg veit bert, hvat tey sjálvi siga.

Vælskapt brek
Fyri nøkrum árum síðani kom fløga út, ið var nevnd vælskapt brek, har ljós bleiv sett á børn við viðføddum breki. Var sjálv á konsertini, ið bleiv hildin í Norðurlandahúsinum. Ein sera góð og rørandi konsert, har temaið var, hvørja gleði hesin bólkur av børnum ber sínum kæru og øðrum við.

Heiti vælskapt brek er eitt ógvuliga vælvalt og sigandi heiti

Ein ríkt tjóð!
Í kvøld 25. januar 2004 sá eg sending í Sjónvarp Føroya um daglidagin hjá Jóannesi Jacobsen, við hansara arbeiði millum menningartarnað. Eg má siga, at tá eg sá M´as Blues Band spæla í Vestmanna skúla, tá rørdist mítt hjarta, og eg hugsaði. Vit eru ník sum samfelag, at eiga hendan vælsignaða bólkin av menniskjum, sum skapa slíka gleði rundan um seg har tey eru. Tøkk skal Jóannes hava, sum í síni fritíð ger hetta frálíka arbeiði fyri at gleða okkum øll. Man tað ikki verða, tí hann sjálvur er vorðin ríkari at vera saman við teimum?

Vit verða fátæk uttan tey
Eg hugsi, um vit sum samfelag skulu sleppa okkum av við tann bólkin av menniskjum við Downs syndrom, hvør verður so tann næsti bólkurin?

Eru við blivin, sum Hitler í nazi tíðini har hann skuldi hava eina reina ariska rasu? Nei, eg spyrji bara. Eitt veit eg, at tá verða vit ógvuliga fátæk sum tjóð, og Gud forbjóði, at so verður.

Tey gera okkum ník!
Zacharias Zachariasen, hevur yrkt ein sang um Brekaða barnið, har síðsta ørindi ljóðar:

Júst hetta lítla barn,
ið mikið brekað var,
mest gleði teimum vann
og størstu signing bar.
Og har, sum sorgin neit,
og royndin var so svár,
nú hoyrist takkarljóð,
og skyggja gleðitár.

Hetta er tað sum eg hoyri og síggi foreldur, avvarðandi og onnur sum hava við brekað og menningartarnað at gera siga.

Tí haldi eg, at vit sum samfelag heldur skuldi hjálpt teimum meir og givið teimum betri kor og sømdir, sum tað sømir seg einum ríkum samfelag, tí tey gera okkum ník.

Sjálv bleiv eg ríkari í kvøld!